# Sig frá um alt landið!

Aftur í ár skipar Almannamálaráðið fyri almennum fundum, har kunnað verður um arbeiðið at steðga harðskapi í føroyskum familjum. Serfrøðingar fara at lýsa, hvussu harðskapur skaðar okkara nærumhvørvi, og hvussu vit steðga honum best. Fundirnir verða hildnir í sambandi við verkætlanina Sig frá og eru skipaðir soleiðis, at fyrst greiðir Elin Winther Poulsen, samskipari, frá verkætlanini. Síðani verða tríggir fyrilestrar frá serfrøðingum. Fyrilestrarnir snúgva seg um, hvussu harðskapur ávirkar børn, fráboðanarskylduna, vit øll hava, um vit gerast stúrin um eitt barn, og um SSP-samstarvið.

At enda verða stundir til spurningar og opið kjak.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

## FUNDARSKRÁ

Vika 7 — 12 FEBRUAR — FUGLAFJØRÐUR, **Bókasavnið**

Vika 8 — 19 FEBRUAR — EIÐI, **Miðhøllin í skúlanum**

Vika 9 — 26 FEBRUAR — VESTMANNA, **Miðhøllin í skúlanum**

Vika 10 — 04 MARS — LEIRVÍK, **Miðhøllin í skúlanum**

Vika 11 — 11 MARS — SUÐUROY, **Skúladepilin**

Vika 12 — 18 MARS — NORÐDEPIL, **Skúlin á Fossánesi**

Les meira um Sig frá verkætlanina á **www.amr.fo**

SKRÁ til øll tiltøk

| | |
|---|---|
| 19.30 | Vælkomin – Elin Winther Poulsen kunnar um Sig frá verkætlanina |
| 19.40 | Hvussu ávirkar harðskapur børn? |
| 20.10 | Fráboðanarskylda / tagnarskylda og tvørfakligt samstarv |
| 20.40 | Ung og harðskapur, SSP-arbeiðið |
| 21.00 | Kjak / spurningar |
| 21.30 | Liðugt |

sig frá

Steðga harðskapi í parløgum og nærsambondum

SENDISTOVAN